# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Millum fremstu lond

Føroyar skulu í 2015 vera millum fremstu lond í heiminum á øllum samfelagsøkjum sigur visjónskjal í 2007, nevnt *Mál og vegir*. Hægri útbúgving og gransking eru millum tey øki, ið vóru raðfest í fremstu røð. *Mál og vegir* er sera áhugavert skjal, har ABC samgongan vísti, at hon var fult á hædd við fremstu stjórnir í Norðurlondum.

So langt so gott. Mong fegnaðust um, at nú var kósin sett móti eini ljósari framtíð og hvat betri var: vit lógu trygg á kósini. Hetta sást ikki minst av valstríðnum, har flokkarnir lovaðu at fremja tey mál og øki, ið vóru raðfest í *Málum og vegum*. Hetta var serstakliga galdandi fyri útbúgving, gransking og mentan. Nú er tað ikki óvanligt, at flokkar og valevni lova gull og grønar skógir í valstríði, og almenningruin hevur vant seg við at taka hesi lyfti við einum veti av salti, tað vil so vera. Tað skal eisini ásannast, at hetta at halda givin vallyfti hevur eisini nakað at gera við búskap og fíggjarvánir.

Tað man vera almen semja um, at útbúgving og gransking hava serstakliga stóran týdning í dagsins samfelag. Vit eru á veg burtur frá tí vøruframleiðandi búskapinum og eru ella áttu at verið á veg inn í vitanarsamfelagið. Henda tilgongd hevur sum fortreyt eitt sera vælútbúgvið fólk, og hetta krevur aftur vælútbúgvnar dygdargóðar útbúgvingarstovnar, har í hvussu er ein týðandi partur av frálæruni er granskingargrundað. Hetta merkir so aftur, at gransking eigur at verða raðfest eins frammalaga og útbúgvingarnar.

Tað vildi verið órættvíst at vilja vera við, at eingi lyfti eru hildin á hesum øki. Landsstýrismaðurin í mentamálum í ABC samgonguni byrjaði tilgongdina, sum skuldi skuldi tryggja, at hægri útbúgvingar og gransking kundu mennast samsvarandi Visjón 21015. Lóggávan varð nútímansgjørd og fortreytir fyri einum nútímans altjóðagjørdum universiteti vórðu skaptar, neyðugar samanleggingar vórðu framdar, og latið varð upp fyri granskingarsamstarvi við ES, har teir stóru granskingarpengarnir eru at finna.

Hóast vit hava fíggjarligar trupulleikar eigur henda tilgongd ikki at verða steðgað her og nú. Gera vit tað, so missa vit meira fyri minni. Hinvegin kunnu vit orsakað av fíggjarligu trongstøðuni vera noydd til at seta ferðina eitt sindur niður. Hetta nýtist ikki at merkja, at tilgongdin verður steðgað, og hon eigur heldur ikki at verða steðgað. Allir partar eiga at hugsa seg væl um og í sátt og semju finna útvegir, sum kunnu tryggja eina javna og trygga gongd fram í móti teimum málum, sum eru sett út í kortið við Visjón 2015. At enda skal her verða nevnt, at ítøkiliga málið um játtanina til Fróðskaparsetrið gerst alt meira løgið. Her stendur orð í móti orð og ilt er at taka dagar millum partarnar. Hetta mál verður í skrivandi stund viðgjørt á løgtingi og verður høvi at taka hetta mál upp her, um viðgerðin bendir á álvasom mistøk hjá ávísum myndugleikum ella einstøkum leiðslum.

**Sosialurin**

## Fíggjar- og skattapolitikkurin eggja til sámuligan atburð

**EYÐGUNN SAMUELSEN**
løgtingskvinna



**Løgtingið viðgjørdi í vikuni eitt uppskot frá Tjóðveldinum um broytingar í kapitalvinningsskattalógini**

Uppskotið snýr seg um at strika møguleikan hjá privatfólki at draga renturnar frá av láni, ið er tikið við tí endamálið at keypa partabrøv. Tað vil siga, at um tú hevur vinning av partabrøvum og hevur tikið lán fyri at keypa brøvini, kanst tú draga rentuútreiðslur av láninum frá vinninginum, innan tú betalur kapitalvinningsskatt. Henda møguleika fingu partafeløg í 2001, og í 2006 var ein broyting gjørd í lógini, so hetta eisini kom at vera galdandi fyri privatfólk.

Hetta at javntstilla ein privatpersón og eitt partafelag er rættiliga prinsipielt. Eitt partafelag rekur vinnuligt virksemi, og vanligt er, at frádráttir verða loyvdir fyri "útreiðslur, sum í árinum ganga til at vinna inntøkurnar, tryggja tær og halda teimum við". Grundgevingin fyri, at henda regla eisini var sett í gildi fyri privatfólk, var líkheitsprinsippið, at man vildi javnstilla privatpersónar og partafeløg. Hetta haldi eg er sera ivasamt, men kann ljóða rætt, um tú bert hugsar um líkheitsprinsipp, tó haldi eg, at hetta reisir aðrar spurningar.

**Lánifíggjað spekulatión**

Skipanin hevur eisini elvt til tjak, um hetta er at lánifíggja spekulatión. Vit vita, at í 2006 og 2007 læntu privatfólk umleið 200 milliónir krónur til at keypa virðisbrøv fyri eftir hesi nýggju reglu.

Vit vita eisini, at eini 200 fólk hava gjørt brúk av hesum møguleika. Um hetta er ein stórur trupulleiki, veldst um eyga, sum sær.

Seinastu mánaðirnir hava vit verið vitni til nógvar syrgiligar lagnur í sambandi við keyp av partabrøvum, serliga í londunum kring okkum.

Tí reisir hetta spurningin, um tað yvirhøvur er rætt, at tað almenna hevur skipanir, ið á nakran hátt stuðla privatfólki í at fara í holt við at gera íløgur í partabrøv. Eigur tað almenna ikki at løggeva soleiðis, at løggávan fremur ein hugburð, ið vit ynskja at hava, og ynskja vit ikki at stimbra ein sámuligan hugburð, kunnu vit spyrja okkum sjálvi.

Eigur tað ikki at vera so, at um fólk gera tílikar íløgur, so er hetta ein avgerð, ið tey sjálvi taka, uttan at tað almenna eigur nakran leiklut í hesum. Hví skal ein privatpersónur gjalda minni í skatt, um hann velur at gera eina íløgu í partabrøv. Hvørja ferð ein bólkur í samfelagnum fær ein skattafyrimun, skulu vit onnur gjalda meira, um ikki, so verður minni eftir av pengum at nýta til tað, ið vit eru felags um, so sum heilsu-, almanna- og skúlaverk. Hesi atlit eiga, eftir mínum tykki, at verða sjálvsøgd í fíggjarpolitikkinum.

**Fíggjar- og búskaparpolitikkur**

Gongdin í heimsbúskapinum við altjóðagerð og eini hálovan av marknaðarkreftunum hava viðført, at marknaðurin hevur víst ein grammleika, ið hevur viðført eina djúpa heimskreppu, ið verður sammett við kreppuna í 1930'unum. Ein orsøk er, at tað er fíggjarheimunurin, sum í ein stóran mun ótálmaður hevur orðað fíggjarligu reglurnar fyri altjóðagerðini. Eftir Berlinmúrurin fall, hevur allur heimurin, meir alla minni, havt eina turkatrúgv til fría marknaðin og liberlismuna. At henda skipan hevur spælt fallitt, er breið semja um í dag, ivaleyst tí politikarnir høvdu nærum slept allari stýring av marknaðinum.

Hvørji amboð hevur tað almenna til at taka? Vit eiga ikki kritikkleyst at venda aftur til gamlar skipanir, men vit mugu læra av tí, ið hent er. Ein læra er í hvussu er, at marknaðarkreftirnar kunnu ikki sleppa at virka púra ótálmaðar.

Hvussu stýra vit so? Ein máti er at gera reglur, sum stimbra tann hugburð, ið vit ynskja at eggja, sum eitt mótsvar til grammleikan. Tað kundi millum annað verið at gjørt skipanir, eisini innan skattapolitikk, ið eggja til at verja umhvørvið og minka um $CO_2$ útlátið. Avsetingin á fíggjarlógini á 15 milliónir, ið fólk kunnu søkja um til at bjálva síni hús, so vit gerast minni bundin at oljuni, er eitt dømi um ein politikk, ið eggjar til ein hugburð ið vit ynskja at fremja.

Sæð í hesum ljósið, er tað ikki rætt at vit hava skipanir, ið kunnu vera við til, at fólk enda í ófvøri. Tað almenna eigur ikki hava nakran leiklut í skipanum, ið elva til ein hugburð, ið er ivasamur.

Javnaðarflokkurin hevur ta støðu, at fíggjar- og búskaparpolitikkurin eigur at eggja til ein samhaldsfastan hugburð, at vit mugu gera skipanir, ið elva til sámuliga atferð, eisini á marknaðinum, við tí endamáli at fáa ein sterkan og sjálvberandi búskap, har samhaldsfesti er í hásæti.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.